# Ongar gávur í Sarpugerði

**VODAFONEDEILDIN Tað er av alstórum týdningi at Víkingur fær skil uppá verjupartin. Í teimum fimm dystunum í Vodafonedeildini, hava víkingar latið 10 mál inn, og er tað ikki nøktandi í longdini, um teir skulu vera við í oddinum**

Ólavur Øre Hansen

Tað er umráðandi hjá Víkingi, at avrikið á Svangaskarði ikki verður endurtikið í Sarpugerði sunnudagin, tá B71 kemur á vitjan.

Felagsliðið úr Gøtu og Leirvík hevur fingið eina rímiliga byrjan uppá kappingarárið. Átta stig eftir fimm dystir er á eini leið í mun til oddaliðini B36 og HB, ið hava trý stig fleiri.

Hóast kappingin higartil hevur verið á eini leið hjá Víkingi, so eru veikleikar at síggja á liðnum. Serliga er tað í verjupartinum at tað hevur haltað. Liðið letur ov nógv mál inn, og er tað ikki nøktandi, um Víkingur ætlar at vera við í oddinum.

Víkingur hevur nakrar spælarar skaddar Eitt nú var Áslakkur Petersen ikki við í dystinum móti B68, og Jógvan Martin Olsen sigur í samrøðu við Sosialin, at hann nokk ikki verður tøkur sunnudagin. Umframt Áslakk so eru aðrir spælarir, sum hava skaða at dragast, men enn er óvist hvussu verður við teimum sigur venjarin hjá Víkingi, sum ikki vil seta nøvn á hálvskaddu leikarnar.

Í mun til Víking, so kann B71 stilla upp við sterkastu manning, sambart B71 venjaranum, Piotr Krakowski. Spurningurin er bara um tað er nokk til at basa felagsliðnum úr Gøtu og Leirvík. Tað er nokk eingin loyna, at Víkingur er favorittur at vinna dystin, tó at B71 áður hevur víst at teir kunnu gera um seg á útivølli. Teir hava leikt javnt á Argjum og í Fuglafirði.

# AB skal hava stig

**VODAFONEDEILDIN Argjamenn hava fingið eina sera ringa byrjan uppá kappingina. Tvey stig fyri fimm dystir er nakni sannleikin**

Ólavur Øre Hansen

Serliga er tað í verjuni tað haltar, har 15 mál eru farin inn í fimm dystum, og er tað als ikki nøktandi

Eitt hvørt lið, sum letur trý mál inn í hvørjum dysti fær trupulleikar, og tað er júst tað sum AB hevur gjørt fyrstu fimm dystirnar í landskappingini. Tí er einki undur í at AB liggur aftast í Vodafonedeildini.

Tað er tí sera týdningarmikið hjá argjamonnum at fáa rættað uppá støðuna sum skjótast. Liðið hevur áður prógvað, at teir kunnu koma langt við eini kompaktari verju. Tískil er neyðugt hjá argjamonnum at grava fram gomlu dygdirnar frá síðsta kappingarári.

Meðan tað hevur gingið illa hjá AB, so gongur fragari hjá fuglfirðingum.Higartil hevur ÍF fingið seks stig í teimum fyrstu fimm dystunum, og tað er á eini leið, hóast fuglfirðinar ikki hava vunnið síðani í fyrsta umfari, tá teir leiktu í Runavík.

Í løtuni liggur ÍF í miðjuni á stigatalvuni, og skulu teir halda sambandið við liðini omanfyri, so er neyðugt at fugufirðingar byrja at vinna dystirnar.

Hjá AB var Morten Overgaard ikki við í síðsta dysti, men hann skuldi verið klárur aftur til dystin sunnudagin.

Hjá fuglfirðingum eru allir mans tøkur, undantikið Høgni Zachariasen, sum bleiv skaddur í steypadystinum móti B68 fyri tveimum vikum síðani.

# Hagtølini tala fyri HB




HAGTØL TALA

*Hagtølini tala fyri at HB-liðskipaparin, Fróði Benjaminsen, fer at vinna á bygdamonnum sínum í Gundadali*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN Í Gundadali kemur tekur HB móti B68, og er talan um ein dyst millum nummar tvey og trý í Vodafonedeildini. Hóast tað eru tvey lið við sjálvsáliti sum bresta saman í Gundadali, so vísa hagtølini, at toftamenn als ikki hava góð minnir úr Gundadali seinastu nógvu árini**

Ólavur Øre Hansen

HB hevur seinastu árini havt eitt sera gott tak á toftamonnum á heimavølli. Tað eru 10 ár síðani B68 síðst vann á HB í Gundadali, tá teir vunnu 3-4 í 2000, so hagtølini tala fyri einum heimasigri.

Hóast nógv hevur verið tosaðu um nýggja spælistílin – ella kanska mangul uppá sama – hjá HB, so skerst ikki burtur, at úrslitini hjá HB hava verið góð. 11 stig í fimm dystum er ikki framúr gott, men samanborið við hini liðini, so røkkur tað til eitt pláss á næst ovastu rók.

Hóast HB ikki hevur verið sannførandi higartil í kappingini, so hava teir klárað at vunnið teir tøttu dystirnar, so sum móti NSÍ, AB og EB/Streymi.

Tað er eingin ivi um at HB hevur ein sera sterkan hóp, men higartil í kappingini hava teir ikki rættuliga fingið glið á spælið. Spurningurin er so bara um glið kemur á eyðkenda HB spælið sunnudagin tá B68 vitjar í Gundadali. Hagtølini geva ábendingar um, at tað kundi verið møguligt.

## B68 hevur staðið seg væl á heimavølli, verri er á útivølli, har teir hava tapt báðar dystirnar

Sjálvt um B68 liggur nummar trý í landskappingini, so er ilt at meta um styrkina á liðnum. B68 hevur staðið seg væl á heimavølli, har teir hava leikt tríggjar dystir, og vunnið allar. Verri hevur gingið, tá B68 hava verið á útivølli, har teir hava tapt báðar dystirnar, móti ávíkavist B36 og FC Suðuroy.

Meðan Kristján Guðmundsson hevur allar sínar leikarar tøkar, so er meira óvist við B68. Ahmed Keita og Remi Langgaard blivu skaddir í steypadystinum móti ÍF, og vóru ikki við í dystinum móti Víkingi mánakvøldið.

Sum skilst hava bæði Keita og Remi vant við fyrstaliðshópinum í vikuni, men avgerð er ikki tikin um teir vera við sunnudagin í Gundadali.

Um so er at Keita og Remi Langgaard ikki vera tøkir til dystin sunnudagin, so er tað avgjørt ein missur fyri B68, sum ikki hevur so breiðan hóp.

post@sosialurin.fo